FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 27. november 2013:**

| | |
|---|---|
| **Dagur:** | Mikudagur 27. november 2013 |
| **Fundarstaður**: | Hotel Føroyar |
| **Til staðar**: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Juanna Joensen, Sára Joensen, Gestur Hovgaard, Tove Bull, stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari, Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri, Malan Marnersdóttir, dekanur, Hans Pauli Joensen, dekanur, Hugin Skaalum, fíggjarleiðari. |
| **Avboð** | Jan Mortensen |
| **Ikki møtt** | Vibeke Michaelsdóttir |

Stýrisformaðurin bjóðaði vælkomin.

1. **Fíggjarviðurskifti**
   - Fíggjarleiðarin kunnaði um fíggjarstøðuna fram til 31. oktober 2013. Fíggjarstøðan vísir, at tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár hevur Setrið eitt samanlagt hall á 1.231 t.kr. í nettoútreiðslujáttanini í mun til meðaljáttanina í sama tíðarskeiði. Tá ið flytingar innanhýsis og enn ikki bókaðar inntøkur eru greiddar, verður roknað við, at fíggjarstøðan javnvigar við ársenda.
   - Rektarin legði uppskot til fíggjarætlan 2014 fram. Samanumtikið vísir uppskotið:

**Fíggjarætlan 2014 fyri Fróðskaparsetur Føroya**

| | | 2014 J | 2014 Ætlan | Munur |
|---|---|---|---|---|
| | Nettoútreiðslujáttan | 71.852 | 71.992 | -140 |
| | Útreiðslur | 76.952 | 77.092 | -140 |
| | Inntøkur | 5.100 | 5.100 | 0 |
| **20** | **Fróðskaparsetur Føroya** | | | |
| | Nettoútreiðslur | 71.852 | 71.992 | -140 |
| | **Útreiðslur** | **76.952** | **77.092** | **-140** |
| 11 | Lønir v.m. | 65.224 | 63.636 | 1.588 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 8.000 | 9.800 | -1.800 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 1.100 | 1.100 | 0 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.528 | 2.556 | -28 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 100 | 0 | 100 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | **5.100** | **5.100** | **0** |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | 1.500 | 1.500 | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.100 | 2.100 | 0 |
| 77 | Flyting frá kommunum til landið | 1.500 | 1.500 | 0 |

Í uppskotnum fer meginparturin av øktu játtanini í 2014 til lønir, meðan raksturin annars, t.e. keyp av vørum og tænastum, fer at verða á sama stigi sum í 2013. Hetta fer at leggja trýst á raksturin.
Gjørt varð vart við, at tað hevur verið spart nógv í rakstrinum á deildunum seinasta árið, og at tað illa ber til við so avmarkaðari rakstrarjáttan í eitt heilt ár aftrat.

Umrøtt varð, hvussu Setrið kann menna heilsugransking og heilsuútbúgving, ið fevnir víðari enn sjúkrarøkt. Umrøðan snúði seg eisini um, at Setrið eigur at menna tvørfakligar masterútbúgvingar soleiðis, at bachelorlesandi fáa betri møguleikar fyri framhaldslestri á Setrinum.
Undir kjakinum viðmælti leiðslan, at raðfest verður at fáa gongd á masterútbúgving á Søgu og Samfelagsdeildini, soleiðis sum tað leingi hevur verið ætlað og almannakunngjørt.

Eindirnar í samanlagda Fróðskaparsetrinum hava ymiskar siðvenjur, tá ið talan er um ársnorm, feriu o.s.fr. Stýrið heitti á leiðsluna um at kanna eftir, um tað ber til at einshátta akademisku ársverkini. Málið eigur at vera, at starvsviðurskiftini hjá somu starvsbólkum uppá tvørs av deildunum verða skipað eftir felags leisti. Eisini eigur at verða kannað, um fyrisitingarligi bygnaðurin kann skipast meira skynsamt.

Stýrið og leiðslan mugu staðfesta, at neyðugt er við greiðari raðfesting, tí avmarkaða tilfeingið loyvir ikki, at øll øki verða ment samstundis.

**Niðurstøða:**

- Leiðslan arbeiðir víðari við fíggjarætlanini fyri 2014 við serligum denti á at økja um rakstrarpartin. Leiðslan sendir stýrislimunum eitt dagført uppskot skjótast gjørligt.

**Frágreiðing frá Landsgrannskoðaranum**

- Frágreiðingin frá Landsgrannskoðaranum varð gjøgnumgingin. Enn er ikki komið heilt á mál viðvíkjandi at leggja fíggjarviðurskiftini um frá at stovnurin virkaði sum sjálvsognarstovnur til at virka sum landsstovnur. Hetta hevur sambært Landsgrannskoðanini ligið ov leingi á láni.

- Avgerð tikin um at seta ein arbeiðsbólk, mannaður við umboðum fyri fyrisitingina og stýrisformanninum, at savna inn tilfar um málið. Síðani verður málið tikið upp við Mentamálaráðið.

## 2. Bygnaður – status/kunning viðv. stýrandi skjølum

**Útbúgvingarleiðarar**
Hesi starvsfólk eru eftir tilmæli frá dekanunum tilnevnd útbúgvingarleiðarar
Jógvan í Lon Jakobsen, Føroyskt mál og bókmentir
Janus Jensen, Læraraútbúgvingin
Annika Antoniussen, Námsfrøði
Hannes Gislason, KT-verkfrøði
Bárður Niclasen, Orku og umhvørvisverkfrøði
Hóraldur Joensen, Lívfrøði
Súsanna Mortensen, Sjúkrarøktarfrøði
Gestur Hovgaard, Samfelags- og stjórnmálafrøði
Hans Andrias Sølvará, Søguvísindi
Kári á Rógvi, Løgfrøði

- Dekanarnir greiddu frá, hvussu bygnaðurin við útbúgvingarleiðarum hevur hilnast. Útbúgvingarleiðararnir hava sera gott fakligt innlit í útbúgvingarnar, men nýggja skipanin krevur, at dekanarnir eru meira til staðar á deildunum fyri at taka hond um ymisk mál, ið áður lógu hjá deildarleiðarunum. Hóast stutt fráliðið tykist fakliga samskiftið betri við nýggja bygnaðinum. Stýrið legði aftur dent á, at tað hevur stóran týdning, at dekanarnir eru sjónligir á deildunum.

- Ávísar deildir hava í tilgongdini mótmælt nýggja bygnaðinum, men fyrstu royndirnar hjá dekanunum við nýggju skipanini benda á, at hon kann koma at rigga væl. Ætlanin er at skipa fyri regluligum fundum millum útbúgvingarleiðararnar á megindeildini, og eisini millum megindeildir. Samskiftið millum dekan og deildarskrivstovurnar er blivið meiri, nú eingin deildarleiðari er at røkja hendan partin.

- Sára Joensen vísti á, at í upprunaliga uppskotinum til nýggja bygnaðin, sum varð lagt fram á stýrisfundi í september, varð ført fram, at deildarskrivarastarvið skuldi styrkjast, men í hoyringsskrivinum, sum varð sent deildarskrivstovunum, sást tað als ikki aftur. Eisini fíltist Sára Joensen á, at skrivararnir ikki vórðu tiknar við í arbeiðið at gera uppskotið.

- Leiðslan vísti á, at arbeitt verður við at orða lýsingina av deildarskrivstovuni betri. Viðmerkingarnar, sum eru komnar inn, verða viðgjørdar á komandi leiðslufundum. Stýrið legði dent á, at hesin parturin av bygnaðarbroytingunum verður settur í verk sum skjótast.

- Semja um at áseta eina freist fyri, nær nýggi bygnaðurin skal eftirmetast. Stýrið tekur bygnaðin upp á næsta stýrisfundi, sum verður 26. februar í 2014.

**Lestrarráð**

- Tørvur er á at skipa lestrarráðini skjótast gjørligt. Semja var um, at rúmd skal vera fyri at lestrarráðini verða skipaði soleiðis, at tey taka hædd fyri møguligum serligum tørvi á deildunum, tvs. at tey kunnu skipast ymiskt, alt eftir tørvi á deildunum.

- Stýrið góðkendi skjalið um lestrarráð við teimum broytingum, sum Sára Joensen kom við.

- Fyrisitingarstjórin kunnaði um ætlanirnar at skipa eina lestrarskrivstovu. Uppskotið um lestrarskrivstovu er til hoyringar hjá starvsfólkunum á Setursskrivstovuni. Tá viðmerkingarnar eru komnar inn og viðgjørdar, verður lýsingin send allari fyrisitingini á Setrinum. Stýrið er samt um, at lestrarskrivstovan er skilagóð og neyðug. Fyrisitingarstjórin kunnaði um, at lestrarskrivstovan eftir ætlan verður sett á stovn á vári 2014.

3. **Strategi** (avgerð tikin um at taka hesi mál av skrá vegna tíðarneyð)
    - Avrikssáttmáli 2013-2016 varð gjøgnumgingin fyri at síggja status yvir, hvørji mál eru nádd.
    - Strategiskjal, status
    - Langtíðarfíggjarætlan

4. **Eftirmeting av Setrinum**
    - Rektarin kunnaði um, hvussu arbeiðið við at eftirmeta Setrið verður skipað. Setrið skal umvegis Mentamálaráðið lata eftirmetingarpanelinum umbiðið tilfar og eina sjálvseftirmeting ultimo mars 2014. Eftirmetingarpanelið kemur á vitjan í mai 2014, har tey m.a. ynskja at tosa við starvsfólk og lesandi á Setrinum. Eftirmetingarpanelið ger eina frágreiðing á heysti 2014.

    - Eftirmetingararbeiðið fer at krevja nógva orku. Rektarin hevur sett Randi Frederiksberg og Elisabeth Holm at samskipa arbeiðið og samskifta mótvegis Mentamálaráðnum.

    - Tove Bull viðmerkti, at skotbráið fyri eftirmetingina er rættiliga stutt.

    - Stýrið staðfesti týdningin av opinleika og kunning í sambandi við eftirmetingartilgongdina. Avgjørt varð, at leiðslan sendir eina kunning út til starvsfólkini um eftirmetingararbeiðið skjótast gjørligt, og støðugt kunnar um arbeiðið.

    - Rektarin kunnaði um arbeiðið við góðskutrygging.

5. **Broytingaruppskot til reglugerð um størv(tikið av skrá)**

6. **Ársrit (tikið av skrá)**

## 7. Starvssetanir 2013

- Adjunktur í móðurmálsundirvísingarfrøði (NÁD) (er sett)
- Fremmandamálsdidaktikkur við enskum (NÁD) (er sett)
- Adjunktur í námsfrøðiligari leiðslu (NÁD) (er sett)
- Adjunktur í støddfrøði (NÁD) (er sett)
- Adjunktur í lívfrøði (NÁD) (er sett)
- Námslektari í støddfrøði (NÁD, tíðaravmarkað 1 ár) (er sett)
- Adjunktur í samfelagsfrøði (SSD) (er sett)
- Námslektari í samfelagsfrøði (SSD, tíðaravmarkað 1 ár) (er sett)
- Granskingarhjálpari samfelagsfrøði (SSD, tíðaravmarkað 1 ár) (er sett)
- Adjunktur í búskaparfrøði (SSD) (er sett)
- Professari í orkuverkfrøði (NVD) (er settI
- Lektari í Støddfrøði (NVD) (er sett)
- Vísindastarv í KT-verkfrøði (NVD) (til metingar)

## 8. Akademiska ráðið

- Løgtingslógin um Fróðskaparsetur Føroya ásetir í § 18, at til tess at ráðgeva rektara og stýri, verður heimilað rektara at seta akademiskt ráð. Stýrið ásetir valreglur og starvsskipan eftir tilmæli frá rektara.

  Uppskot til reglugerð fyri akademiska ráðið varð lagt fram.

  Kjakast varð um, hvussu ráðið eigur at verða sett saman, m.a. um rektarin eigur at sita í einum ráði, sum ráðgevur honum (og stýrinum). Dømi eru tó um á øðrum universitetum, at rektarin situr í akademiska ráðnum. Hildið varð, at hetta óivað er einasta formliga fora, har rektarin hevur møguleika fyri beinleiðis samskifti við vísindaliga starvshópin. Tí var semja um, at rektarin eigur at sita í akademiska ráðnum. Hinvegin varð ikki hildið neyðugt, at dekanarnir sita í ráðnum, tí tað vil geva eina ov tunga leiðsluumboðan í ráðnum. Spurningurin um at hava umboðan úr uttanhýsis vísindastovnum, ið samstarva við Fróðskaparsetur Føroya, m.a. við at lata vísindastarvsfólk hava atknýtt lektarastørv, varð umrøddur. Ført varð fram, at akademiska ráðið í verandi bygnaði er einsta fora, har vísindaligi starvshópurin, sum er vaksandi, hevur møguleika fyri at føra fram síni sjónarmið mótvegis leiðsluni. Tí varð hildið rættast, at akademiska ráðið verður fyri vísindaligu starvsfólkini, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya.

- Spurningurin um ph.d. lesandi eru lesandi ella partur av vísindaliga starvsfólkahópinum hevur verið umrøddur áður. Ikki er heilt greitt, um ph.d. lesandi verða konsekvent viðfarin í so máta. Stýrið er tó samt um, at ph.d. lesandi, sum fáa “løn” í sambandi við lesnaðin og útføra arbeiðsuppgávur, ið kunnu samanberast við tær hjá vísindastarvsfólkum, hoyra til vísindastarvsfólkahópin.

- Niðurstøða: Við viðmerkingunum omanfyri tekur stýrið undir við uppskotinum. Endalig útgáva verður send stýrinum til góðkenningar ella kemur fyri aftur á komandi stýrisfundi.

**Ymiskt**

- Umboðið fyri lesandi í stýrinum skal veljast skjótast gjørligt. Arbeitt verður við at broyta tíðarskeiðið, soleiðis at tað betur fylgir lestrarárinum.

- Rektarin kunnaði um, at tillagingar verða gjørdar við próvbókini. Samstundis legði hann dent á, at hon verður broytt soleiðis, at t.d. skeivleikar av góðskrivingum ikki skulu koma fyri.

- Vantandi lestrarumhvørvi og plásstrot avmarkar upptøkuna. Hetta er í andsøgn við politiska viljan um, at Setrið skal bjóða fleiri útbúgvingar út. Stýrisformaðurin og rektarin fara at biðja um fund við landsstýrismannin og aðalstjóran í Mentamálaráðnum í næstum. Ætlanin er tá m.a. at umrøða hølisviðurskiftini.

- Ráð teirra lesandi er stovnsett og hevur sín fyrsta fund 28. november.

- Komandi stýrisfundir:
  - 26. februar 2014
  - 17. juni 2014
  - 18. september 2014
  - 19. november 2014

- Á fundinum 26. februar 2014 fer stýrið at eftirmeta stýrisarbeiðið, sí § 24 í Reglugerð um virksemið hjá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Fundurin lokin kl. 17.30

Skrivað hevur fyrisitingarstjórin